gult24 cyan24 magenta24 svart24



## ÍSF og ikki B36

Vit nevndu í blaðnum í gjár, at landsdysturin millum Russland og Føroyar skuldi sýnast í B36-húsinum fríggjakvøldið.

Ein broyting er nú hesum viðvíkjandi, tí tað vísti seg, at B36-húsið var upptikið til onnur endamál hetta kvøldið.

Ístaðin hevur ÍSF játtað 12. m,anni at nýta loftið í ÍSF húsinum, og verður tað sostatt har, at dysturin verður sýndur.

Altso verður landsdysturin millum Russland og Føroyar sýndur í ÍSF-húsinum fríggjadagin kl. 20.00.

**jm**

# Ófríður á Luzjniki

**Stórur ruðuleiki var í Moskva um vikuskiftið á sama leikvølli, sum føroyska landsliðið royndi seg á**

ÓFRIÐUR
*Jákup Mørk*

Tá Føroyar spældu á Luzjniki stadion í Moskva, varð bert ein áskoðari handtikin fyri at gera um seg, men so friðarligt gekk tað ikki fyri seg, tá toppdysturin í russlandi varð leiktur um vikuskiftið.

Dysturin stóð millum tey bæði stóru høvuðsstaðarliðini, Spartak Moskva og CSKA Moskva, og ikki kann sigast annað enn, at áskoðararnir løgdu nógva orku í dystin.

Ikki færri enn 669 fólk vórðu handtikin undir dystinum, og tá skaðarnir vórðu gjørdir upp, varð komið fram til, at 1.436 setur restaðu í á áskoðaraplássunum. Hesi vórðu undir dystinum nýtt til at kasta eftir viðhaldsfólkum hjá mótstøðuliðunum.

Spartak Moskva, sum heldur til á Luzjniki Stadion, vann annars dystin 1-0.



*Tá Føroyar spældu var tað bert hesin eini áskoðarin, sum gjørdi somikið nógv um seg, at handtøka varð neyðug*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Eingi løtt lið eftir

**Tað varð týðiliga undirstrikað í fyrru fjórðingsfinalunum, at einki av liðunum longur skal rokna við nøkrum løttum dysti, tað sum eftir er av kappingini**

MEISTARAKAPPING
*Jákup Mørk*

»Leeds er helst tað veikasta av teimum liðum, sum eru eftir í kappingini« Soleiðis málbar spanski miðvallarin hjá Deportivo la Coruna, Victor, seg, tá hann skuldi gera viðmerkingar til møguleikarnir hjá sponsku meistarunum at spæla seg fram til hálvfinalurnar í sonevndu Champions League kappingini.

Nú er tó líkt til, at miðvallarmaðurin noyðist at svølgja einar tveir stórar kamelar, tí mett eftir fyrru fjórðingsfinalunum, er Leeds so avgjørt ikki veikasta liðið í kappingini, heldur øvugt.

Yorkshire felagið var nevnliga hitt einasta, sum megnaði at vinna við fleiri málum í fjórðingsfinaluni, og eftir trygga 3-0 sigurin á Ellan Road tykjast teir nú vera einasta liðið, sum mest sum hevur tryggjað sær atgongd til hálvfinaluna.

Hóast talan sjálvandi var um eitt stórt liðavrik, so skaraði verjuleikarin, Ian Harte, tó fram um viðleikarar sínar. Fyrst legði hann við beinleiðis frísparki lið sítt á odda, og síðani átta hann næst seinast fótin á málunum hjá Alan Smith og Rio Ferdinand. Hesin seinni hevði annars ikki skorað mál í meira enn fýra ár, og tí var fagnaðurin sjálvandi ovur stórur, tá hann við triðja málinum at kalla tryggjaði Leeds sessin í hálvfinaluni.

### Javnt í hinum

Annars vórðu hinar tríggjar fjórðingsfinalurnar trý góð dømi um, at tá komið er somikið langt í kappingini, er einki sum eitur løtt mótstøðulið.

Týskvøldið noyddist Real Madrid at ásanna hetta, tá teir hálvgum tóku sær av løttum, efitr at hava lagt seg á odda 2-0 móti Galatasary, men við trimum málum í seinna hálvleiki eydnaðust turkunum at venda dystin, soleiðis at alt nú er púrasta opið undan seinnu hálvfinaluni.

Á Old Trafford í Manchester eydnaðist endiliga Bayern München at fáa hevnd fyri finalutapið móti Manchester United fyri tveimum árum síðani, tá Sergio skeyt einasta málið í dystinum teirra millum. Talan var annars um ein fult uppibornar útisigur til týska liðið, sum sostatt stendur við betru kortunum undan seinna dystinum. Manchester hava tó áður sýnt, at teir ikki gevast fyrr enn seinasta brírkslið hevur ljóðað, og ivaleyst eru týskararnir fult greiðir um hetta, soleiðis at teir ikki taka sær av løttum í München.

Seinasta fjórðingsfinalan stendur millum enska Arsenal og Spanska Valencia, og her eydnaðist onglendingum at vinna 2-1 á heimavølli. Støðan í hálvleikinum var annars 1-0 til gestirnar, eftir at Ayala hevði heilfluktað ein bólt upp undir nettakið stutt fyri hálvleik. Við tveimum málum innan tríggjar minuttir eydnaðist tó Arsenal at snara øllum á, soleðis at teir nú standa seg við javnleiki í seinna dystinum. Um hetta fer at eydnast, er so ein onnur søga, sum ikki verður greidd fyrr enn um tvær vikur.

Úrslitini og málskjúttarnir í fyrru hálvfinalunum vóru annars hesi:

**Týsdagin, 3. apríl**
Manchester United-Bayern München 0-1 (0-0)
0-1: Sergio 86.

Galatasary-Real Madrid 3-2 (0-2)
0-1: Helguera 33.
0-2: Makalele 43.
1-2: Umit Davala 47 (br.)
2-2: Hasan 66.
3-2: Jardel 75.

**Mikudagin, 4. apríl**
Leeds United-Deportivo la Coruna 3-0 (1-0)
1-0: Harte 27.
2-0: Smith 51.
3-0: Ferdinand 66.

Arsenal-Valencia 2-1 (0-1)
0-1: Ayala 41.
1-1: Henry 58.
2-1: Parlour 60.

# Dómararnir settir

**FSF hevur boðað frá, hvørjir dómarar eru settir til at døma teir dystir, sum eru eftir í bólkaspælinum fyri steypakappingina**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Tað er ein strævin dystarskrá, sum liggur fyri framman hjá teimum 12 feløgunum, sum skulu dystast í bólkaspælinum í steypakappingini. Frá leygardegnum og góða viku fram, skal hvørt liðið avgreiða fýra dystir. Spælt verður nú leygardagin, skírishósdag, páskaaftan og 2. páskadag, áðrenn komið er fram til, hvørji tey átta liðini verða, sum skulu taka lut í fjórðingsfinalunum. Umframt hesar fýra dystirnar, eiga FS Vágar og NSÍ eisini ein dyst til góðar, og verður hesin leiktur hósdagin, 19. apríl.

Umframt dystirnar hjá mansliðunum, er gongd nú eisini komin á steypakappingarnar hjá hinum deildunum, har tað somuleiðis eru hópin av dystum, sum skulu avgreiðast.

Dómarar skulu sjálvandi eisini til fyri at avgreiða dystirnar, og FSF hevur nú sent dómarayvirlitið fyri hesar dystir út. Niðanfyri verður víst, hvør dómari skal døma í einstøku dystunum í kappingini um løgmanssteypið.

**Bólkur 1**
07.04 KÍ-B68 Birgir Sondum
07.04 B71-ÍF Eiler Rasmussen
12.04 B68-ÍF Niklas á Líðarenda
12.04 B71-KÍ Petur Hansen
14.04 B71-B68 Oddmar Andreasen
14.04 KÍ-ÍF Suni Johansen
16.04 B68-KÍ Eiler Rasmussen
16.04 ÍF-B71 Birgir Sondum

**Bólkur 2**
07.04 GÍ-HB Suni Johansen
07.04 B36-TB Oddmar Andreasen
12.04 HB-TB Regin Egholm
12.04 GÍ-B36 Lassin Isaksen
14.04 B36-HB Niklas á Líðarenda
14.04 GÍ-TB Petur Hansen
16.04 HB-GÍ Lassin Isaksen
16.04 TB-B36 Oddmar Andreasen

**Bólkur 3**
07.04 EB/S-VB Niklas á Líðarenda
07.04 NSÍ-FSV Lassin Isaksen
12.04 FSV-VB Eiler Rasmussen
12.04 NSÍ-EB/S Suni Johansen
14.04 NSÍ-VB Birgir Sondum
14.04 EB/S-FSV Lassin Isaksen
16.04 VB-NSÍ Niklas á Líðarenda
16.04 FSV-EB/S Petur Hansen
19.04 FSV-NSÍ Tummas P. Olsen

gult25 cyan25 magenta25 svart25



H71–Tjaldur 26–27 (11–12)

# Tjaldur hevur enn møguleikan

**Við sigrinum á H71 varveitti Tjaldur møguleikan fyri at sleppa av botnsessinum. Hoyvíkingar mugu hinvegin bara bíða og vóna, at tað ikki eydnast runavíkingunum at fáa fleiri stig**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað vóru tey bæði niðastu liðni í landskappingini hjá monnum, sum hittust í Ítróttahøllini á Hálsi í Havn mikukvøldið.

Hetta spegladist eisini aftur í áhuganum, sum sýndur var fyri dystinum. Á dómaraseðlinum vóru 50 áskoðarar skrásettir fyri at hava møtt upp, men talið av gjaldandi áskoðarunum hevur helst ligið nakað væl niðanfyri hetta.



*Hóast talan ikki var um nakran vakran dyst, so eydnaðist tað Tjaldrinum at varveita vónina um at sleppa av niðasta sessinum á stigatalvuni*

### Alla tíðina javnt

Um hugt verður eftir sjálvum spælinum, so er tað kanska heldur ikki undur í, at tað júst eru hesi bæði liðini, sum liggja niðast. So at siga alla tíðina var talan um sera rótut spæl. Hvørgin av pørtunum megnaði nakran tíð at fáa rættiliga ferð á spælið, soleiðis at verjurnar kundu spælast tunnar, men hinvegin var verjuspælið heldur ikki á høgum støði, og tí komu hóast alt rættiliga fitt av málum í dystinum.

Sum úrslitið í sær sjálvum sigur, so var býti av málunum eisini rættiliga javnt, og hetta var eisini høvuðsreglan í dystinum, tí tað kom ongan tíð fyri, at meira enn tvey mál skiltu partarnar.

Tað var eisini hetta, sum meira ella minni helt lív í dystinum, tí lítli munurin syrgdu um ikki annað fyri, at spenningur alla tíðina var um, hvønn veg dysturin skuldi fara. At byrja við skiftust liðini bæði um at hava leiðsluna, men tað lá tó líka sum í kortinum, at tað skuldu verða gestirnir, sum fóru av stað við sigrinum.

Ikki tí at hoyvíkingar ikki høvdu væl fatur á alla tíðina, men heldur tí teir at kalla ongan tíð megnaðu at gera sær dælt, tá teir fngu møguleika at skræða seg leysar. Ikki minst kom hetta til sjóndar í brotskøstunum, har hoyíkingar misnýttu ikki færri enn seks av teimum níggju, sum teir fingu tillutað í dystinum.

At Jodic Zelko megnaði at taka somikið stóran part av brotskøstunum, sigur sjálvsagt nakað um hansara styrki í mann móti mann støðum. Har telist hann helst millum teir allarbestu í landinum, og hetta gav hann eisini fleiri onnur dømi um. Hinvegin kundi hetta eisini bent á eitt slag av mentalum bremsuklossa hjá hoyvíkingum, tí tað er neyvan av tilvild, at teir í hondbóltshagtølunum eru tað liðið, sum hevur misnýtt lutfalsliga flestu brotskøstini.

### Rok í endanum

Javnstøðan í málunum helt sær sum sagt allan dystin á tamb, og hetta viðførdi eisini, at tað fram móti endanum íkomu nakrar sera spentar støður.

Tjaldur sá út til at hava skapt sær ein avgerandi fyrimun, tá teir tríggjar minuttir fyri leiklok løgdu seg fram um við tveimum málum, men tá H71 beinan vegin minkaði niður aftur í eitt, øktist spenningurin aftur. Tjadur megnaði ongan tíð at skora aftur, men tá hoyvíkingar hóast fleiri møguleikar heldur ikki megnaðu at skora, so rukku tey 27 málini hjá Tjaldrinum kortini til sigurs.

Hoyvíkingar vóru tó alt annað enn nøgdir um hetta, tí hildu seg hava rætt til í øllum førum eitt mál afturat. Fyrst misnýtti Halgir enn eitt av mongu brotskøstunum hjá hoyvíkingum, og nakað seinni varð álopsfeilir dømdur móti toppskjúttanum, tá hann í kapprenning við ein runavíking mundi komið leysur í einum mótálopi.

Rokmiklasta hendingin kom tó, tá bert fá sekund vóru eftir at spæla. Fyrst hevði H71 tríggja metra kast. Uppstilling var gjørd, har Halgir ætlandi skuldi royna seg, men tá hann leyp upp, varð hann skræddur ógvusliga niður av Dejan Macut. Hjá dómaranum var einki annað at gera at reka jugoslavan av vølli, tí talan var um ein av sonevndu professionellu feilunum. Dejan var sjálvandi greiður um, at Tjaldur skuldi vinna, um teir skuldu varveita møguleikan at sleppa úr botninum, og hóast hetta ikki á nakran hátt er tekin um góðan ítróttaanda, so var hetta nóg mikið til at steðga mótstøðumanninum.

Hóast dómararnir beinan vegin valdu harðast møguligu revsingina - burturvísing - so hildu hoyvíkingar helst ikki, at hetta var nóg mikið. Í øllum førum royndu fleiri teirra at leggja eftir jugoslavanum, og úrslitið av hesum vóru tvær diskvalifikatiónir til hoyvíkingarnar.

Umframt illu spælararnar, var illsinnið í hoyvíkisleguni somikið stórt, at sjálvt tíðtakarin í fullari ferð leyp av pallinum og yvir móti leikarunum, og hóast hann ikki slapp fram at jugoslavanum, so var púra greitt, hvat endamál hansara við hesum var.

### Vónbrot hjá báðum

Sum tað framgongur av stigatalvuni her á síðuni, so var her talan um seinasta dystin hjá hoyvíkingum hetta kappingarárið. Eitt kappingarár, sum í einstøkum førum hevur víst, at knotur eru í ungu monnunum, men sum í nógv størri mun hevur prógvað, at tað skal rættiliga nógv til, áðrenn teir av álvara skulu gera seg galdandi í kappingini.

Fyrst og fremst tykist venjingarstøðan hjá fleiri av leikarunum als ikki at vera nóg góð. Hetta er ein somikið grundleggjandi lutur í spælinum, at er hesin ikki til staðar, er ógvuliga avmarkað, hvørjar vónir liðið skal seta sær sjálvum.

Sjálvandi hevði tað heldur ikki gjørt skaða, um ein ella tveir sterkir leikarar vórðu fingnir til vega, tí í løtuni er Halgir alt ov einsamallur, tá tað ræður um at skjóta mál. Gaman í telist hann millum bestu álopsleikarar í landinum, men tá liðið at kalla ikki hevur aðrar streingir at spæla uppá, gerst tað heila alt ov einstáttað, soleiðis at mótstøðuliðini kunnu leggja rættiliga einfaldur ætlanir um, hvussu hoyvíkingarnir skulu steðgast.

Hjá runavíkingunum stendur ikki nógv betri til. Stórar vónir vórðu settar, tá liðið í ár fekk styrk av fyrst tveimum og síðani trimum útlendskum leikarum, men úrslitini av hesum hava enn ikki verið sjónlig. Ikki tí, ofta hevur verið nær við, men væntandi orka hevur helst gjørt sítt til, at tað sjáldan er blivið til meira enn næstan.

Runavíkingarnir hava tó enn ein møguleika, tá teir um vikuskiftið taka ímóti kollfirðingum. Fæst stig úr hesum dysti, slepur Tjaldur av niðasta sessinum, men um so skal verða, skal mundandi betri skil fáast á spælið. Kanska telir tað til teirra fyrimun, at kollfirðingar einki hava at spæla fyri, men ein sigur skal tó á ongan hátt roknast fyri ein sjálvfylgja. Tað tosar stigatalvan sítt sólarklára tos um.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
H71: Johnnu Durhuus 6, Halgir Dahl Olesen 5(2), Hallur Danielsen 4, Olaf Vestergaard 4(1), Agnar Højgaard 3, Anfinn N. Debess 2, Rene Dahl Olesen 1, Høgni Joensen 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 7, Svein í Heiðunum 4, Dejan Macut 4, Tummas Magnussen 4, Arnfinn Langgaard 4, Dánjal Kjærbo 3, Ragnar Olsen 1
Brotskøst: H71 9, Tjaldur 1
Útvísingar: H71 3, Tjaldur 3
Diskvalifikatiónir: H71 2 (báðar beinleiðis reytt)
Burturvísing: Tjaldur 1

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 10 | - | 0 | - | 1 | 726 | 548 | 178 | 32 |
| 2 | StÍF | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 674 | 595 | 79 | 24 |
| 3 | Kyndil | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 640 | 585 | 55 | 21 |
| 4 | Neistin | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 570 | 579 | -9 | 18 |
| 5 | KÍF | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 557 | 612 | -55 | 15 |
| 6 | H71 | 12 | 1 | - | 0 | - | 11 | 605 | 703 | -98 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 11 | 1 | - | 1 | - | 9 | 528 | 678 | -150 | 6 |